


Myndir: Hilmar Jan Hansen & Oliver Joensen

SOSIALURIN



NORÐLÝSIÐ

# Báðir kliktu í senn

TAÐ ER IKKI ALTÍÐ, AT MUNURIN MILLUM **LOKALPRESSUNA** OG **HØVUÐSTAÐARPRESSUNA** ER SO STÓRUR

Tað er allahalgannadagur, og klokkan er tríggjar minuttir í hálvgum fýra. Staðið er ítróttarhøllin í Vestmanna, har kvinnuliðini hjá VÍF og Stjørnuni dystast í Sunsetkappingini. Heilt fitt av áskoðarum eru til staðar henda seinnapartin, og teirra millum eru eisini tveir myndamenn, annar frá Norðlýsinum og hin frá Sosialinum.

At blaðstjórin á Norðlýsinum, Oliver Joensen, er til hondbóltsdyst í Vestmanna, er ikki á hvørjum degi, men hesin sunnudagurin er eitt sindur øðrvísi, tí bæði tey fremstu hondbóltsliðini hjá klaksvíkingum vitja, og tað er nakað, Norðlýsið fegið vil dokumenterað fyri norðoyingum. Millum áskoðararnar eru eisini nógvir norðoyingar, tí nakað eftir kvinnudystin skal fyrsta manslið hjá Team Klaksvík spæla ímóti næstbesta mansliðnum hjá VÍF.

Men aftur til kvinnudystin, sum ríður um snarið, tí ungu vestmannakvinnurnar vilja ikki sleppa teimum royndu úr Klaksvík, men tá ið 19 minuttir eru farnir av seinna hálvleiki, ger spælskiparin hjá Stjørnuni, Joan Midjord Djordjevic, tvey mál, sum skulu vísa seg at verða rættiliga avgerandi fyri endaliga úrslitið.

Støðan er tann, at Stjørnan er á odda 20-17, tá Joan skjýtur Stjørnuna fram um 22-17, og VÍF kemur ongantíð afturíaftur í dystinum.

## Splittsekund á muni

Myndamaðurin hjá Norðlýsinum hevur gjøgnum tað nógva av dystinum hildið til við innara málið, sum er beint við dyrnar, meðan myndamaðurin hjá Sosialinum hevði hug at vála eitt sindur meira inni í høllini. Men júst hesa løtuna, tá Joan setti alt upp á pláss í dystinum, vóru báðir í sama enda.

Oliver stóð nakað úti í horninum høgrumegin, meðan Hilmar Jan stóð beint við síðuna av málinum, somuleiðis høgrumegin. Um tað so var fyrra ella seinna málið, ið fekk báðar at klikkja í senn, vita vit ikki, men í øllum førum endaði tað við, at teir tóku mynd av sama máli, men bert við splittsekundi ímillum!

Suðuri í Havn hevur Hilmar Jan júst valt sær eina mynd út, sum skal koyrast í Sosialin dagin eftir, tá hann fer inn á heimasíðuna hjá Norðlýsinum at forvitnast eftir, hvat Oliver hevði um dystin. Tá sær hann myndina av Joan, sum er tikin í júst somu løtu sum myndin, hann hevur valt sær út til blaðið.

Hvør moralurin so er í hesi søgu, kann hvør einstakur gera sær sínar tankar um, men hetta man í øllum førum vera prógv fyri, at viðhvørt kunnu høvuðsstaðarpressan og lokalpressan í Norðoyggjum – hóast alt – vera so samdar, at bara eitt lítið splittsekund ger munin ...

## INNIHALD


4 REPORTASJA: **SAMGONGAN STRÍÐIST FYRI AT YVIRLIVA**
6 TIPS: **JÓLASØLA HJÁ VARDU VERKSTØÐUNUM**
7 90 SEKUND: **HØGNI MOHR SVARAR**
10 GREINARØÐ: **FRÁ DEYÐA Í GRØV**
11 10 TING UM: **LISA LENTS**
12 TIL ARBEIÐIS: **TÆNARIN LINDA MIDJORD**
14 REPORTASJA: **TÍ TATOVERA VIT OKKUM**
16 TÓNLEIKUR: **FRÆNDUR VIÐ NEISTUM**
19 UMAFTURAFTURUMAFTUR: **HØGNI DJURHUUS**
20 REPORTASJA: **SOLEIÐIS BÚGVA TEY Í CHRISTIANIA**
23 TÓNLEIKUR: **CHRISTEL - KROPPUR OG POPPUR**
24 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
27 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **SUKURLÁTAMOUSSE**
31 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR osfr.**
32 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**


# Tann **grái** dagurin

## KLUMMA

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Hvar er tín útlongsul og tín ævintýrhugur, heimføðingur?

Jú, vandin er, at onkur sleingir tann spurningin í fjesið á mær, nú eg vil póstanda, at hesin grái føroyski gerandisdagurin er fínasta slag, og at eg trívist við tað, eg geri her og nú her.

Eg føli ikki, at eg forsømi nakað, nú eg siti og skrivi hesa klummuna. Eg droymi meg ikki burtur til fremmand lond, har eg kundi upplivað aðra mentan, mál og mat, sóla mær, dippa tærnar í heitt hav og skolda ryggin av søtari sól. Eg angri meg ikki grønan av, at eg ikki sitið á café í Hamburg og havi lært meg týskt, so tað minnir um týskt. Og í grundini kemur tað mær ikki ein gongd í huga, at eg kundi tikið eitt ár úr kalendaranum og arbeitt í fiski – tunfiski – uttanfyri Marsascala á Malta.

Men nógv av okkum leingjast. Ikki hvønn dag og kanska ikki altíð so langt, men burtur. Og vit leggja planir um, hvussu vit skulu sleppa úr gerandisdegnum, og hvussu alt tá verður betur.

Danski yrkjarin Benny Andersen skrivar í yrkingini *De rigtige mennesker* um okkum norðurlendingar, sum vilja sleppa burtur: *at rejse / bort fra varmedunk og medisterpølse / rejse ud til de rigtige steder /hvor de rigtige mennesker spiser rigtig mad / bor i rigtige huse med rigtige balkoner (...) i norden har man snue, kræft, misundelse /i norden går man udenom pytterne /uden om statuerne / uden om hinanden.*

Og skrekkurin er sjálvandi borgarliga lívið í grannalagnum. Hús, hundur og Honda. Klokkan er farin av fimm, bilurin er paralellparkeraður, eplini farin út á, radio stendur frá, og eftir døgurðan verður tað antin ein fótbóltsdystur ella ein sjónvarpsrøð.

Stóri spurningurin er kanska, hvat mann vil hava burtur úr lívinum. Og í grundini er tað upp til okkum sjálvi. Vit kunnu liva lukkulig í grannalagnum, um vit tola ljósini frá lyktapelunum á gøtuni. Men vit kunnu eisini royna at fevna allan heimin – uppliva so nógv, at vit minnast ikki helvtina – men ongantíð støðast. Sum Bjørn Afzelius svii hugleiðir: *Sæð hálvan heimin kanst tú ongantíð temjast, besti vinur mín.*

Og apropos vinir, so segði ein, at tað er í fínasta lagi at fara út í heim og royna at røkka stjørnunum. Tú skalt bara vita, at tú kanst smekka heysin í mánan.

Og hetta vóru tankarnir í dag. Í morgin er ein nýggjur dagur.

VIKUSKIFTI
**Redaktørar:** Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Jensen
**Forsíðumynd:** Jóhanna í Króki / Jens Kristian Vang